## Vakstrarhús lata aftur

Fleiri íslendskir bóndur, sum dyrka blómur og grønmeti í vakstrarhúsum, vóru í gjár uttan fyri Altingið í Reykjavík og mótmæltu, at elorkan er dýrkað rættiliga nógv í seinastuni. Bóndurnir kærdu seg um, at elprísurin er hækkaður 30 prosent í ár, og at tað noyðir fleiri teirra at sløkkja og at lata vakstrarhúsini aftur. Teir misnøgdu bóndurnir vilja hava politikararnar at geva vakstrarhúsunum serligan avsláttur í elprísinum. Ber tað ikki til, verða fleiri uttan iva noyddir at gevast við virkseminum, segði formaður teirra, Bjarni Jónsson, við Morgunblaðið.



## Eingin byggir skip

Fyri ikki so langari tíð síðani kundu norsku frálandaskipasmiðjurnar fegnast um at hava nóg mikið av arbeiði fyri ár fram í tíðina, men fíggjarkreppan hevur broytt viðurskiftini. NTB skrivar, at tá 2011 fer at halla, eru bíleggingarbøkurnar tómar. Orsøkirnar eri tvinnar. Onnur er, at tað er sera trupult at fáa fígging til at byggja skip til frálandavinnuna, og harafturat hevur fíggjarkreppan gjørt, at inntøkurnar hjá slíkum skipum eru komnar undir trýst. NTB skrivar, at fleiri skip liggja svínabundin, og at reiðarí, sum ætlaðu at byggja nýtt, hava lagt sínar ætlanir í skuffuna.

# Seyðalortar forðar føroyingum við útbúgving at flyta heimaftur

**Fimm tinglimir hava nú lagt uppskot fyri Løgtingið um at áleggja teimum, sum eiga seyð, hestar, neyt og flogfenað, at stika framvið vegnum bæði innanbíggja og uttanbíggja fyri at forða fyri, at seyður sleppur á vegin**

SEYÐURIN AV VEGNUM
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Seyðalortur á vegum og í túnum kann vera ein orsøk til, at føroyingar við útbúgving ikki koma heimaftur.

Hetta er ein av nógvum grundgevingum, sum fimm løgtingslimir føra fram, nú teir hava lagt uppskot fyri Løgtingið um at fáa seyðin burtur frá túnum og urtagarðum hjá fólki og at fáa seyðin av vegnum, bæði innanbíggja og uttanbíggja.

Teir fimm tingmenninir, Magni Laksáfoss, Helgi Abrahamsen, Eyðgunn Samuelsen, Tórbjørn Jacobsen og Sjúrður Skaale, halda, at skulu ung fólk, ið hava tikið longri útbúgvingar í útlondum, vilja búleikast í Føroyum eftir at hava livað í mong ár undir meiri skipaðum viðurskiftum, er neyðugt, at seyðurin fær eitt meiri hóskandi pláss í samfelagnum.

- Tað er ikki hugaligt, hvørki fyri eyga ella heilsu, at seyðalortur liggur í túninum har børn spæla og fólk ganga, tá ein er vanur við aðrar umstøður, siga teir fimm løgtingslimirnir.

### Hegna seyðin úti

Uppskotið hjá teimum gongur í stuttum út upp á, at nú skulu kommunur fáa heimild til at krevja av teimum, sum eiga, ross, neyt, geitir og flogfenað, at stika fyri, soleiðis at dýrini ikki sleppa á vegin og inn í urtagarðar og tún hjá fólki.

Ímillum bygdir skal tann, sum eigur vegin, altso landsstýrismaðurin í vinnumálum ella Landsverk, fáa heimild til at krevja, at tey, sum eiga dýr í haganum, skulu stika fyri, so at dýrini ikki sleppa á vegin.

Men innangarðs kunnu eisini tey, sum eiga veg, krevja, at tann, sum eigur seyð, ross, neyt, geitir og flogfenað, stikar fyri, so at dýrini ikki sleppa inn á ognina.



*Fimm Løgtingslimir vilja nú hva løgtingið at samtykkja eina lóg sum avmarkar rættindini hjá seyði, rossum og neytum rættiliga nógv. Verður seyður, ross ella neyt ákoyrd, skal tað hereftir verða bóndin, sum betalir fyri skaðan á bilin*

| Ár | Óhapp | Orsøkin seyður | Orsøkin rúsdrekka |
|---|---|---|---|
| 2008 | 340 | 36 | 21 |
| 2007 | 329 | 63 | 18 |
| 2006 | 353 | 63 | 26 |
| 2005 | 361 | 48 | 13 |

Higartil hevur tað verið so, at verða seyður, neyt, ross ákoyrd, er tað bileigarin, sum hevur skyldu til at betala endurgjald bæði fyri skaðan bil og dýr.

Men teir fimm løgtingslimirnir vilja nú hava løgtingið at samtykkja, at tá ið dýr elvir til skaða, skal tann, sum eigur dýrið, hava alla ábyrgdina og betala tann skaða, sum dýrið elvir til á bilin, samstundis sum at hann onki endurgjald fær fyri dýrið.

### Fleiri ferðsluskaðar

Men orsøkin til, at teir fimm løgtingsmenninir gera hetta er ikki bara fyri at lokka føroyingar við útbúgving hendavegin.

- Hetta er liður í eini roynd at skunda undir tilgongdina at fáa meiri tíðarhóskandi viðurskiftir fyri seyð í Føroyum, siga teir.

Løgtingsmenninir vísa í hesum sambandi á, hvussu stóran skaða seyður, ross og elvir til í ferðsluni.

Hvørt ár fáa nógvir bilar skaða umframt at fólkaskaði hendir av ov á av tí at seyður og dýr verða ákoyrd.

- Hóast tað er meiri sjáldsamt, at mannalív verða mist orsakað av seyði á vegnum, eiga vit tó at seta okkum spurningin, um seyðurin veruliga hevur størri týdning enn mannalív?

Tað er eisini ein royndur lutur, at nógvur seyður og stórdýr verða løstað og láta lív í ferðsluni.

- Vit eisini at hugsa um ta sváru og sera ósømiligu dýrapínslu, ið stendst av hesum umrøddu viðurskiftum, siga teir fimm løgtingsmenninir.

Men umframt tað pengaliga, eigur eisini at verða hugsað um sálarliga kvøkkin, ið stendst av, at fólk renna á eina ær ella eitt smálamb.

Eftir upplýsingum frá Landsverki er seyðurin atvoldin til nógv fleiri óhapp á landsvegnum enn Rúsdrekka. Landsverk metir eisini, at umleið tríggjar ferðir so nógv óhapp við seyði á vegnum verða meldað til tryggingarfeløgini, enn frágreiðingarnar hjá løgregluni vísa. Niðurstøðan er, at seyður á vegnum er orsøkin til meiri enn triðingin av ferðsluóhappunum á landsvegnum

### Til stóran ampa

Somuleiðis vísa teir fimm løgtingsmenninir á, at seyðurin er til stóran ampa fyri royndirnar at fríðka um í bygdum øki. Her verður bæði hugsað um urtagarðarnar hjá privatum fólki, almennar viðarlundir og onnur tiltøk at fríðka um í bygdum øki.

- Tað er ein sannroynd, at tað er prógvað, at tað er gott fyri sálarstøðuna hjá fólki, sum eru sálarliga illa fyri, at stákast í urtagarðinum. Somuleiðis er urtagarðsarbeiði eitt sjálvsagt ítriv hjá eldri fólki, sum royna at halda seg í gongd á ellisárum.

- Her kann tað vera ein dyggur smeitur og drepandi fyri hugin, at seyðurin eftir stuttari løtu kann oyðileggja alt, sum fólk hava roynt at byggja upp.

### Ikki trumlast ígjøgnum

Uppskotsstillararnir hava ikki mett um, hvussu nógv tað fer at kosta, at hegna seyðin burtur frá vegum, túnum og urtagarðum.

Men tað veldst eisini um, nær og hvar myndugleikarnir fara at krevja, at hegn verður sett uppverður sett um hegn.

Teir gera eisini vart við, at hegnskylda verður ikki eitt beinleiðis krav, men at men myndugleikarnir kunnu krevja at hegn verður sett upp á ávísum støðum.

- Men slíkt krav kann ikki setast fram fyrilitaleyst og tað má hugsast um at nyttan, sum fæst burturúr at hegna, stendur mát við kostnaðin og avmarkingarnar av tí, sigur Helgi Abrahamsen, sum er ein av teimum, sum leggur uppskotið fram.

Hann sigur eisini, at fyri at gera tað biligari er ætlanin at broyta lógina, so at festarar kunnu betala hegnið av festikontuni.